# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 20.04.2026 kl. 16.30

Á fundi: Janus Thomsen
Poul Laust Christiansen
Rakul Mørk
Jónfinn L. Poulsen
Jóhannes Liasson Rasmussen
Thorstein Thomsen (fyri Otto West)

Ikki møtt: Ronni Hammer

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

1. **102-27-2026: Umsókn um stuðul til mentanardagar í Sandvík.**
   Ætlanin er at skipa fyri mentanardøgum í Sandvík í summar og søkir Bygdarfelagið á Rananum um kr. 15.000,00 í stuðli til hetta tiltak.
   **Trivnaðarnevndin 19.04.2026:**
   Nevndin er samd um at játta Bygdarfelagnum kr. 15.000,00, treytað av, at tiltakið verður.
   **Fíggjarnevndin 20.04.2026:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at játta hesum, treytað av, at tiltakið verður.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

2. **102-25-2026: Umsókn um byggiloyvi til útbygning á matr. nr. 140c, Hvalba.**
   Til viðgerðar umsókn um byggiloyvi til útbygning á eystursíðuni á Norðbergsvegi 3, Hvalba.
   **Tekniska nevnd 19.04.2026:**
   Nevndin mælir til, at loyvi verður givið at byggja.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndini og byggimálsviðgeranum og geva byggiloyvi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum og treytum annars sambært BK17.

3. **102-13-2026: Felags integratiónssamskipari.**
   Í sambandi við felags fund tann 26. mars 2026 um setan av felags integratiónssamskipara í Suðuroynni, er samandráttur frá fundinum gjørdur, sum kommunurnar skulu viðgera og góðkenna.
   **Fíggjarnevndin 20.04.2026:**
   Samtykt varð einmælt at mæla til at góðkenna teir karmar, ið eru ásettir í fundarfrágreiðingini frá 26. mars 2026.

**Avgerð**:
Einmælt samtykt.

4. **102-28-2026: Uppskot um at seta ungdómssamskipara.**
Uppskot frá Janusi Thomsen um at seta ungdómssamskipara í starv umleið 10 tímar um vikuna. Mælt verður til, at Trivnaðarnevndin fær heimild at orða starvslýsing og gera innihaldið fyri ein ungdómssamskipara, sum síðani verður lagt fyri bygdaráðið.
**Trivnaðarnevndin 19.04.2026:**
Nevndin fer at arbeiða við og orða eina starvslýsing fyri ein ungdómssamskipara, sum vónandi verður klár til næsta bygdaráðsfund.
**Avgerð**:
Samtykt varð einmælt, at Trivnaðarnevndin ger uppskot til starvslýsing v.m.

5. **102-26-2026: Valnevndin í Sandvík – val av umboði.**
Emmy Klettheyggj hevur boðað frá, at hon ikki ynskir at halda fram sum umboð í valnevndini í Sandvík.
**Avgerð**:
Samtykt varð einmælt at velja Sverra Jacobsen sum fast umboð í nevndina. Sum varaumboð varð einmælt samtykt at velja Áka Bertholdsen.

6. **102-22-2026: Eykajáttan 2026 – 2. viðgerð.**
Søkt verður um eykajáttan fyri løgur 2026.

| | |
|---|---|
| Millumbygningur á dagstovninum | kr. 280.000,00 |
| Vatnveiting | kr. 200.000,00 |
| Fótbóltsvøllur Sandvík | kr. 150.000,00 |
| Bingjuplássið Hvalba | kr. 360.000,00 |
| Eykajáttan íalt | **kr. 990.000,00** |

**Fíggjarnevndin 20.04.2026:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at játta umsóknini um eykajáttan til løgur. Eykajáttanin verður fíggjað við tøkum peningi.
**Avgerð**:
Einmælt samtykt.

5. **Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.20

Janus Thomsen    Poul Laust Christiansen    Rakul Mørk    Thorstein Thomsen

Jóhannes Liasson Rasmussen    Jónfinn L. Poulsen